# ÍTRÓTTARBLAÐIÐ

Sosialurin 4. februar 2010




Esbern Patursson og hoyvíkingar høvdu í gjár allar møguleikar at seta seg á næstfremsta sessin í Atlantic Airways-deildini, men teir megnaðu ikki at halda høvdið kalt seinastu løtuna

Mynd: Álvur Haraldsen

## Kyndil-H71 28-28 (15-13):

# H71 helt ikki høvdið kalt

**Hoyvíkingar høvdu vunnið sær allar trumfirnar, men seinastu fimm minuttirnar bar einki til, og so broyttist einki í hondbóltsoddinum**



jakup@sosialurin.fo

Jákup Mørk

Tá liðini fóru undir seinna hálvleik, bendi alt annars á ein greiðan heimasigur. Mest sum alt fyri eitt fingu hoyvíkingar mann útvístan, og tað nýtti Kynidl til at vinna seg upp á 17-13. Lítla løtu seinni vórðu hoyvíkingar aftur raktir av útvísing, og so kundi og skuldi Kyndil punkterað uppgerðina.

Men mest sum alt gekk galið hesa løtuna. Johan Hofgaard tók tað, sum var at taka í málinum, og í álopinum skoraði navnin á vinstra veingi eftir vild. Næstu 12 minuttirnar vann H71 ikki minni enn 8-1, og hóast eitt time-out hjá Kyndli fekk steðgað gongdini, so minkaði munurin als ikki. Partarnir skutu eitt mál hvør størsta partin av tíðini, og seks minuttir fyri leiklok svaraði H71 enn einaferð aftur við máli til 28-24.

Við at halda høvdið kalt. Bíða eftir rætta møguleikanum og annars dríggja tíðina, skuldi verið lag á manni at avgjørt dystin. Men H71 gjørdi einki av hesum. Kyndil fór út í mansverju í eini 4-2 verju, og hóast hetta gav stórt pláss til restina av hoyvíkingunum, so funnu teir ikki vegin fram við Erlingin Johannesen, sum fann sær stórspælið fram í tøkum tíma. Janus Einar Sørensen skræddi seg leysan í seinastu álopsroyndini, og seinastu sekundini megnaði H71 ikki at nýta til nakað stórvegis.

### Spenningurin heldur sær

Illa ber til at siga annað enn, spenningurin um pláss í FM-finaluni framvegis heldur sær. Í so máta var tað kanska upplagt, at dysturin í gjár endaði við javnleiki, tí ein vinnari her kundi veruliga lagt seg skutin fram um restina í oddastríðnum.

Í spælinum var eisini sjónligt, at tað var hetta, sum báðir partar løgdu seg eftir. Ferðin var høg – kanska ov høg í løtum – og í løtum var talan um einstaklingaavrik á hampuliga høgum støði.

Fyrst og fremst var talan tó um tvey kollektiv, sum hvør í sínum lagi vildu prógva, at tey eiga sín sjálvsagda luttøkurætt til FM-finaluna.

Í so máta var talan avgjørt um ein dyst, sum báðir partar kundu brúka til nakað, og megna liðini at byggja upp á góðu løturnar í komandi dystunum, verður talan neyvan um niðurflytingarstríð av nøkrum slag.

## FAKTA

**Kyndil-H71 28-28 (15-13)**
**10 min:** 4-4
**20 min:** 10-10
**40 min:** 18-18
**50 min:** 21-24
**Málskjúttar**
**Kyndil:** Janus Einar Sørensen 8, Bárður Johannesen (1)7, Høgni Klein 4, Josef Abrahamsen 3(2), Hans Áki Dal-Christiansen 2, Tummas Pauli Hanusarson 2(1), Høgni Klein Olsen 1, Kenn Zachariassen 1
**H71:** Dánjal Tórgarð 8(1), Esbern Patursson 5, Poul Kjartan Dam 5, Janus Sørensen 4, Rógvi Sørensen 2, Gunnar Bláberg 1, Rúni V. Højgaard 1, Tróndur Vatnhamar 1, Freddie Poulsen 1
**Brotskøst:** Kyndil 5, H71 1
**Útvísingar:** Kyndil 4, H71 5
**Dómarar:** Andreas F. Hansen & Eyðun Samuelsen

## Missa høvdið

Esbern Patursso hjá H71 var alt annað enn nøgdur, tá tað eftir dystarlok kundi staðfestast, at H71 misti sigurin á stokkinum.

- Vit klára ikki at halda høvdið kalt. Nakrar fáar minuttir fyri leiklok eru vit frammanfyri við fýra málum, men teir koma so út at mansverja, og tá steðgar alt hjá okkum upp.

Vil tað siga, at tit nú mugu til at umhugsa, hvørji onnur vápn eru til at taka, tá mótstøðan byrjar at mansverja.

- Nei, slettis ikki. Vit høvdu avtalað, hvussu vit skuldu gera, um so var. Men vit klára ikki at halda høvdið kalt, og tað er sjálvandi beiskt at stafðesta, segði Esbern Patursson.

**-mørk**

## Halda ikki støðinum

Um rætt varð borið at, so skuldi Kyndil helst avgjørt dystin longu tíðliga í seinna hálvleiki, tá teir við einum manni í yvirtali vóru fýra mál á odda.

- Vit brenna snøgt sagt ov nógv. Vit spæla okkum áhaldandi fram til kjansirnar, men vit brenna alt ov nógv, og hevur verið ein trupulleiki hjá okkum alt kappingarárið. At vit í periodum í dystunum ikki eru nóg fokuseraðir.

- Hinvegin stríða vit okkum væl aftur, sjálvt um tað sá rættiliga svart út ta einu løtuna. Soleiðis sum dysturin lagaði seg, var tað ikki av leið, at vit fingu javnleik burturúr, sigur Høgni Klein.

**-mørk**